

**Tað verður upprunaliga manningin í Vestmonnum, ið fer á pallin á Summar Festivalinum. Lagt er upp til eina ógloymandi løtu við kenda bólkinum úr Vestmanna**

# Afturhvarv við Vestmonnum

**Við vælkendum sangum sum Motormani, Eg siti so eina og Ró fær nostalgiin neyvan nakran enda, tá Vestmenn gera comeback á Vágsbøi. At talan so eisini er um upprunamanningina frá 1983 ger tað heila bara enn meiri fullført**

Fyri fyrstu ferð í eini 15 ár verður upprunamanningin í vælumtókta bólkinum, Vestmonnum, á palli aftur.

Sangir sum Eg siti so eina, Í nátt eg droymdi, Ró og Motormani fara at ljóða á Vágsbøi, og verður tað uttan iva ein nostalgisk løta.

- Vit hava valt sangir, sum fáa fólk í gott lag, og sum tey kunnu syngja við til, sigur frontmaðurin í Vestmonnum, Ólavur Højgaard.

Bólkurin byrjaði fyrireikingarnar til festivalin fyri einum góðum mánaði síðani, og hava tey bæði vant saman og sum einstaklingar. Tað er neyðugt at venja fyri seg sjálvan eisini, tá ein framførsla liggur mitt í hægstu frítíð, men sambært Ólavi hevur hetta als ikki verið nakar trupulleiki fyri tað.

Tað gekk eisini sum eitt spæl at fáa upprunamanningina samlaða til hetta høvið at spæla og syngja saman aftur.

Avtalan millum Vestmenn og Summarfestivalin kom í lag tíðliga í ár, og sigur Ólavur, at øll manningin játtaði at vera við beinanvegin.

- Man gleðir seg sjálvandi til eina tílíka framførslu, men minnast skal til, at hetta er ein uppgáva, sum skal røkjast so væl sum gjørligt, sigur Ólavur Højgaard.

## Ordans gjøgnumbrot

Tað var í 1983, at Vestmenn komu inn á føroyska tónleikapallin við einum braki. Fyrsta útgávan hjá teimum, Brot, seldi fleiri túsund eintøk fyrstu vikuna, og Vestmenn gjørdist ein tann fólkakærasti føroyski bólkurin í 80'unum.

Við sangum sum Eg Siti So Eina, Motormani, Ró og fleiri gjørdust Vestmenn ein tann mest spældi bólkurin í føroyska útvarpinum. Sangirnir hjá teimum blivu ein fyri og annar eftir landskendir, og nú sløk 25 ár seinni kunnu Vestmenn fara á pallin við eini langari røð av hittum og kendum sangum.

## Útgáva

Vestmenn arbeiða annars við eini nýggjari útgávu fyri tíðina, og fløgan kemur út einaferð tíðliga næsta ár. Men tað verða ikki teir nýggju sangirnir, sum verða framførdir á festivalinum. Manningin í Vestmonnum, sum arbeiðir við fløguni, er ikki tann sama, sum fer á pall í Klaksvík.

- Man kann ikki seta fólk á pall at syngja sangir, sum tey ikki kenna, sigur Ólavur Højgaard og heldur fram, at tað hevði ikki passað til uppgávuna hjá Vestmonnum á Summarfestivalinum at borðreitt við ov nógvum nýggjum og ókendum sangum.

- Vit leggja okkum eftir at tað skal vera ein framførsla við einum farra av nostalgi, tí vit hava valt sangir, sum fólk kenna frá áttati- og níti árunum, sigur sangarin í Vestmonnum.

Upprunamanningin í Vestmonnum, sum kemur á Summarfestivalin, er: Ólavur Højgaard, Martin Joensen, Niels Olsen, Jógvan Toftum Olsen, Bogi Olsen, Rúna á Heygum og Jórun Højgaard.